# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tjóðveldi 60

Í hesum døgum eru liðin seksti ár, síðan Tjóðveldisflokkurin varð stovnaður. Flokkurin var eitt úrslit av fólkaatkvøðuni tann 14. september 1946, ið gav ein lítlan meiriluta fyri loysing. Loysingin varð av ongum, og vónsvikin loysingarsinnað fólk tóku seg saman og stovnaðu nýggjan flokk við loysing á skránni. Tjóðveldisflokkurin, sum flokkurin nevndist, helt frá byrjan eina sterkt vinstrahalla kós umframt, at loysingin var fremst á skránni. Flokkurin markeraði seg frá fyrsta degi sterkt í føroyskum politikki. Við Erlendi Patursson, sála, hevði flokkurin ein framúrskarandi og vælútbúnan formann.

Fyrstu árini rak flokkurin ein politikk, ið fevndi um eina kompromisleysa tjóðskaparkós. Men samstundis rak flokkurin ein sterkt vinstrahallan og miðvísan politikk í ávísum merkismálum. Lønar- og almannakor fiskimanna, læknastríðið í Klaksvík, búskaparkreppan í fimmtiárunum, sjómarksmálið og NATO málið myndaðu góðan gróðrarbotn fyri einum slíkum politikki.

Flokkurin vann undirtøku og stjórnarábyrgd undir heimastýrislóg, sum í floksins eygum var og er avynnubarnið í føroyskum politikki. Hann var soleiðis við í sjálvstýrissamgonguni í 1963, vísti seg sum stjórnardugnaligan og pragmatiskan. Nýggj ættarlið komu til, meira pragmatikkur og aðalmálið tóktist blána í sjónarringinum, men valdið fall væl, og tómligt gjørdist vinstrumegin í politiska spektrinum. Politikkur snýr seg nú einaferð um vald og valdið at býta ágóðar samfelagsins. Í sjeytiárunum framdi eitt nýtt ættarlið í Javnaðarflokki, Fólkaflokki og Tjóðveldisflokki í eini óvanligari samgongu stórar broytingar á týðandi samfelagsøkjum, og lutur Tjóðveldisfloksins lá ikki eftir.

Eftir kreppuna í nýtiárunum sá nýggi formaðurin teir tjóðskaparpolitisku møguleikar, sum kreppan bar í fangi. Knappliga var fullveldið í eygsjón. Fullveldislandsstýrið royndi úti sum heima nýggjar politiskar leiðir og loysnir í tjóðskaparliga stríðnum. Men samgongan helt ikki. Flokkurin misti stjórnarvald, og formaðurin fór miðvíst undir at nútímansgera flokkin við nýggjum navni og nýggjari skrá, sum niðurtónar loysingina hóskandi til nýggja tíð. Við Høgna Hoydal hevur Tjóveldi fingið ungan karismatiskan, dugnaligan og djarvan formann – ein genialan kommunikator, sum sameinar tað hugsjónarliga við tað pragmatiska. Hann hevur megnað at savnað ung vælútbúgvin fólk rundan um seg, og hetta er ein styrki fyri flokk og formann. Tjóðveldi hevur prógvað sítt virði í føroyskum politikki, og brúk er sjálvandi fyri flokkinum, ið aftur hevur stjórnarvald. Hóast broyttur frá at standa á odda í stættarstríði fiskimanna- og verkamanna í fimmtiárunum til at vera forsprákari fyri liberalum marknaðarbúskapi í nýggju øldini, stendur hann sterkur. Vit ynskja hjartaliga tilukku og minna á, at teigar og útvarpsrás okkara enn sum áður eru tøk í politiska orðaskiftinum og í samskiftinum við Føroya fólk.

**Sosialurin**

## Hvat vigar meir hjá samhaldsføstu samgonguni, handilslívið í Havn ella Sandoyggin?

RÚNI HENTZE



Tað hevur undrað meg nógv, at landsstýrið hevur lagt Sandoyartunnilin saman við Skálafjarðartunlinum, meðan møguleikin at leggja hann saman við verandi undirsjóvartunlum, ikki so mikið sum verður nevndur, sjálvt um tað átti at verið ein sjálvfylgja. Hesir tunlar eru almenn ogn og hava yvirskot í rakstrinum. Teir kundu sostatt verið eitt gott íkast til raksturin av Sandoyartunlinum. Tí undrar tað meg, at landsstýrið heldur fer eftir einum privatum partafelag, sum onki aktiv hevur. Harvið er ikki sagt, at Skálafjarðartunnilin ikki eisini eigur at vera í felagnum, helst eigur hann tað, tá samtykt verður at fara undir at byggja hann.

Orsøkin til hesa løgnu mannagongd er helst, at landsstýrið má hava eina grundgeving fyri at útseta Sandoyartunnilin fyri at sleppa í gongd við Skálafjarðartunnilin beinanvegin.

Hví tað hevur so stóran skund hjá landsstýrinum at gera Skálafjarðartunnilin, kann bert gitast um, men fyri meg er tað púra ókiljandi. Eysturoyggin er eitt væl útbygt og vælvirkandi øki við øllum hugsandi tilboðum, bæði innan handil, vinnu, mentan og útbúgving. Eysturoyggin hevur harumframt fast samband bæði til Havnar, Vágar og Norðoyggjar.

Tað sama kann tíverri ikki sigast um Sandoynna. Fólkatalið bara minkar og fiskivinnan er í stórari afturgongd (næstan útdeyð). Ongir møguleikar eru fyri útbúgving ella læruplássi, uttan at flytast má av oynni. Miðnámsskúlar verða bygdir runt um í landinum og stovnar fluttir til útjaðaran, men Sandoyggin fær ongan lut í hesi tilgongd. Tann vónin, sum var kveikt, tá Sandoyartunnilin varð samtyktur í løgtinginum í heyst, sær nú eisini út til at verða køvd.

So er spurningurin, hvat liggur sum grund fyri at raðfesta Skálafjarðartunnilin fram um Sandoyartunnilin. Eysturoyggin fær ikki skaða av at bíða nøkur ár eftir tunlinum til Havnar. Men fyri tær ætlanir, sum skulu fremjast í Hoyvíkshaganum, er Skálafjarðartunnilin so mikið avgerandi, at tann ætlanin neyvan fer í gongd, fyrr enn Skálafjarðartunnilin er komin upp á pláss.

Um tað er so, at ætlanirnar í Hoyvíkshaganum og Skálafjarðartunnilin eru knýttar hvør til annan, hví letur man so ikki tað privata eiga uppgávuna?

Uppgávan hjá løgtinginum er at skapa trivnað fyri allar borgarar í landinum. Fyri Sandoynna er tunnilin ein avgerandi treyt bæði fyri vinnulív, útbúgving og mentan, og eigur at fáa fyrsta prioritet. Eg skilji ikki, at eitt øki, sum frammanundan spruttar av lívi, skal uppgraderast enn meir, meðan Sandoyggin verður slept upp á fjall. Tað er skyldan hjá samgonguni, at syrgja fyri, at fólk í Sandoynni fáa sama møguleika til útbúgving og aðrar ágóðar, sum allir aðrir borgarar í landinum hava í dag. Tað er meir umráðandi beint nú, enn at lívga um handilslívið í høvuðsstaðnum.

So er spurningurin, hvussu samgongan, sum hevur „samhaldsfesti" sum skjaldramerki, fer at raðfesta. Eg trúgvi lítið uppá, at fíggingin verður so nógv dýrari, um Sandoyartunnilin verður hin fyrri, sum verður gjørdur, serliga, um allir 4 tunlarnir verða lagdir í eitt felag og Skálafjarðartunnilin fer óivað at verða ein góð forrætning, sjálvt um hann verður útsettur 4 ár.

## Fundarsamtykt

Eftir innbjóðing vóru umleið 150 fólk úr Sandoynni savnað í Ungmannafelagshúsinum í Skopun tann 20. mei 2008 fyri at tosa um, hvat vit kunnu gera fyri at ávirka politisku myndugleikarnar, so ætlaði undirsjóartunnilin til Sandoynna verður framdur sambært løgtingssamtyktina um sama.

Fundurin heitti á løgtingsmenninar úr Sandoynni um at standa fastir við, at tunnilin skal byrja skjótast og í hesum valskeiðinum. Øll kendu seg ótrygg, um málið verður útsett til næsta valskeið, tí helst fær ein samtykt um tað somu lagnu, sum fyrra samtyktin nú sær út til at skula fáa. Ongin trygd er fyri, hvat eitt nýtt løgting kann semjast um!

Sandoyggjafólk liva í vónini um, at hesin tunnil gerst veruleiki, og hevur hetta skapt eina týðiliga optimismu um, at hóast broyttu liviumstøðurnar í landinum, so vildi hetta samband geva møguleika hjá bæði leikum og lærdum at havt fastan bústað her, fyri ikki at tala um møguleikar hjá vinnulívi!

Okkum kunnugt hevur ongin íløguætlan áður fingið eina sovorðna neiliga umtalu, hóast upphæddirnar hava verið stórar, men í hesum føri verður hetta sett upp ímóti fólkatalinum, hóast vit rokna hetta at vera eina íløgu í føroyska samfelagið.

Vit vóna ikki, at henda neiliga støða verður okkara fyrsta roynd av, hvussu skipanin við einum valdømi fer at roynast, at hjarta og sál hjá tingfólki ikki er til staðar fyri øllum landinum!

Tí vilja vit inniliga heita á landsstýrið saman við løgtinginum, at henda tunnilsætlan verður framd nú, og ikki útsett til næsta valskeið.

**Vegna fyrireikingarbólkin:**

Fríhild Winther
Arndis Nicolajsen
Mads A. Hansen
Elisabeth Leo
Eyðun Viderø

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.